Ben Arabo, stjóri og Wayne Kirk, tekniskur stjóri hjá Atlantic Petroleum seta út í kortið framtíðina hjá føroyska oljurisanum

# AP setir út í kortið og fulla ferð á motorin

**Jan Müller**

06.12.2013 - 11:22

Oljan.fo

**Tað eru júst fimtan ár síðani, at føroyingar tóku seg um reiggj og stovnaðu Atlantic Petroleum. Í dag er felagið einki minni enn ein oljurisi sæð við føroyskum eygum og ætlar felagið sær ikki at helma í, nú felagið eigur lut í ikki færri enn 40 loyvum í fýra londum. Nú ræður so um at koyra meira ferð á motorin og bjóðar felagiðføroyingum og útlendingum at keypa partabrøv. Endamálið er at útvega 150-200 mill. Kr., sum m.a. skulu brúkast til at vaksa um leitingina í Norra.**

## Blackbird leiðin góðkend

Atlantic Petroleum boðar í dag frá, at bretsku myndugleikarnir hava góðkent eina víðari útbygging av Blackbird leiðini í bretska partinum av Norðsjónum . Hetta merkir, at ein framleiðslubrunnur afturat verður boraður á leiðini tíðliga í 2014. Felagið framleiðir frammanundan olju og gass úr einum brunni á leiðini.

Nexen Petroleum er fyristøðufelag á Blackbird leiðini, og ognarparturin hjá Atlantic Petroleum er 9,4%.

Fyrr í hesari vikuni boðaði Atlantic Petroleum frá, at frammleitt verður nú aftur úr Chestnut leiðini eftir ein stuttan framleiðslusteðg. Orsøkin til steðgin var, at ein av tólv akkersketum hevði slitið. Brekið er nú umvælt, og hinar akkersketurnar eru kannaðar.

Harumframt boðaði Atlantic Petroleum herfyri frá, at felagið hevði fingið í boði fýra loyvi afturat í 27. loyvisumfari í Bretlandi. Samlaða talið av loyvum, sum felagið hevur fingið tillutað í hesum loyvisumfari, er átta.

Á norska keypsskálan

Atlantic Petroleum verður í næstum skrásett á norska keypsskálanum. Í hesum sambandi fremur felagið eina kapitalhækking. Komandi tveir dagarnar vera kunnandi fundir í Føroyum, seinni í dag kl. 15:30 verður almennur fundur í Østrøm og í morgin, leygardagin kl. 13:30 verður almennur fundur í Løkshøll í Runavík.

Felagið ætlar at útvega 150–200 mió. kr. og peningurin skal millum annað brúkast til at økja um leitivirksemið í Noregi. Í 2014 verður Atlantic Petroleum eisini virkið aðrastaðni. Í Føroyum fer felagið saman við Statoil, ExxonMobil og OMV at bora á loyvi 006, Brugduni, og í BretlandiPegasus leitibrunnin í sunnara parti av Norðsjónum saman við fyristøðufelagnum Centrica.

Atlantic Petroleum varð stovnað í 1998 og hevur í dag 40 loyvi í 5 londum. Felagið hevur skrivstovu í Tórshavn, London og Bergen og tilsamans starvast 30 fólk hjá felagnum. Eginognin 30. september 2013 var 490 mio. kr.